Álit

í

løgtingsmáli nr. 20/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lestrarstuðul
(Hækkaður lestrarstuðul - fylgilógaruppskot til FLU 2026)

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóni Nolsøe Joensen, hevur lagt málið fram 30. september 2025, og eftir 1. viðgerð 21. oktober 2025 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 29. oktober og 4. og 12. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við MFS, Ráð Teirra Lesandi á Fróðskaparsetrinum, landsstýrismannin í almanna- og mentamálum, Eirik í Jákupsstovu, og landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum, Djóna Nolsøe Joensen, saman við Studna.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Ein meginorsøk til, at fleiri enn neyðugt fara av landinum at nema sær hægri útbúgving er, at tað í Føroyum kann vera trupult at fáa endarnar at røkka saman. Vit tapa kappingina um okkara ungu lutvíst orsakað av, at vit bjóða lægri lestrarstuðul enn grannalondini.

Tí fegnast nevndin um, at lestrarstuðulin nú hækkar, so hann kemur uppá sama stig sum í t.d. Danmark. Hetta er eitt týðandi stig rætta vegin.

Samstundis ásannar nevndin, at enn halta aðrar umstøður og sosialar skipanir nakað eftir. Tó so, fleiri tiltøk, ið stuðla undir at taka hægri lesnað í Føroyum, eru farin av bakkastokki og sjósett. Her kunnu m.a. nevnast átøk til fleiri lestrarbústaðir, kampus og býlisstuðul, sum eru sett út í kortið.

Undir hoyringini í nevndini er komið fram, at summi lesandi umframt lestrarstuðul fáa veiting frá Almannaverkinum, ið er treytað av ymsum viðurskiftum. Meðan nøkur teirra fara at fáa fullan ágóða av hækkingini av lestrarstuðlinum, eru onnur hvørs inntøka ikki hækkar av hesum. Hetta valdast hvørjari fyriskipan, tey eru fevnd av. Hesi verða tó framvegis betur stillaði enn tey, ið einans fáa lestrarstuðul.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 13. november 2025

Karlot Hergeirsson formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Uni Holm Johannesen
Hervør Pálsdóttir	Liljan Weihe	Magnus Rasmussen
	Bárður á Lakjuni	